Avloysarastarv á Ferðaráð Føroya

Fyri fólk í farloyvi á marknaðardeild Ferðaráðsins, er eitt avloysarastarv leyst at søkja.
Starvstíðin er avmarkað til 12 mdr. Fólkið, sum skal setas skjótast gjørligt, kemur at fáast við útgávuvirksemi Ferðaráðsins, felagstiltøk okkara við ferðavinnuna her á landi og uttanlands og hevur hartil PR-arbeiðið stovnsins um hendi.

Arbeiðið fevnir m.a. um
- gerð av faldarum, sum venda sær til ferðamannin og søluliðini
- gerð av tilfari, sum lýsir ferðalandið Føroyar
- gerð av tíðindaskrivum til føroyskar og útlendskar fjølmiðlar
- samskipan og gerð av lýsingum
- skipan av kunningarvitjanum til Føroya
- skipan av vinnufundum og verkstovum

Tín kunnleiki og royndir
- útbúgving ella royndir innan marknaðarføring og/ella ferðavinnu
- royndir innan ferðavinnu og kunnleika til ymsu søluliðini
- royndir innan projektleiðslu og samstarv við eitt nú grafisk virkir
- innlit í nýtslu av teld (Windows, Word, Excel og DTP)
- málsliga væl fyri í skrift og talu (føroyskt, danskt og enskt)

...annars vænta vit, at tú
- megnar at gera eitt hugskot til veruleika og hevur áræði, arbeiðssemi og góð samstarvsevnir

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og viðkomandi yrkisfelag.

Umsóknin skal vera Ferðaráðnum í hendi í seinasta lagi 23. august 2002. Viðmerk á brævbjálvan »Umsókn«. Nærri upplýsningar kunnu fáast við at ringja til
Heri Niclasen, stjóra, telefon 31 60 55.

Ferðaráð Føroya
Postboks 118
110 Tórshavn

Lærlingur

Søkt verður eftir lærlingi til bókhaldið.

Umsøkjarar við HH-prógvi hava fyrimun.

Umsókn við møguligum prógvum og upplýsingum um royndir annars skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 25. august 2002.

Meira fæst at vita við at venda sær til skrivstovu okkara á tlf. 345900 og tosa við Jóannes á Váli ella Ninu Djurhuus.

P/F SMYRIL LINE
Postboks 370
110 Tórshavn

Hús í Klaksvík til sølu

Adressa: Kráargøta 37
Stødd á húsum: 50,5 m² x 2,
báðar hæddir innrættaðar
Stødd á grundøki: 316 m²
Urtagarður er uttan um húsini
Byggiár: 1950.

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Áhugaði kunnuv enda sær til:

P/F STATUS
Postrúm 250
700 Klaksvík
Tlf. 457500

Skrivari

Hervið verður søkt eftir skrivara til landsapotekaran at byrja 1. okt. 2002.

Arbeiðið fevnir um telefonavgreiðslu, brævskriving, skráseting (journalisering) og annars alt fyrifallandi skrivstovuarbeiði á stovninum.

Fyrimun hevur umsøkjari við:

- Skrivstovuútbúgving.
- Teldukunnleika á brúkarastøði.
- Kunnleika til teldustýrda skráseting (journalisering).
- Dugir væl at orða seg skrivliga.
- Kann arbeiða sjálvstøðugt.

Starvið er skipað sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið við bólking í 15. lønarflokki.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Hera Mørkøre, landsapotekara, á telefon 317137 millum kl. 10.00 - 15.00.

Skrivlig umsókn við prógvum og møguligum viðmælum skal verða landsapotekaranum í hendi í seinasta lagi 23. august 2002.

Landsapotekarin
Staravegur 15
Postsmoga 3087
FO-110 Tórshavn

Eiðis skúli

Fyri lærara í sjúkrafarloyvi verður søkt eftir lærara til tíðaravmarkað starv í Eiðis skúla

Starvið er 16 tímar um vikuna.

Á tímatalvuni er: Føroyskt 7 fl.
Enskt 7. fl.
Heimstaðarlæra 2./3. fl.
Serundirvísing

Starvið er tíðaravmarkað frá 19. august til 1. november 2002, og verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokki 18,1 til 27,4

Meira kann fáast at vita um starvið frá skúlaleiðaranum á tlf. 423579 ella 229045.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. august 2002.

Eiðis skúli
/Vagn Foldbo
470 Eiði

Eiðis skúli hevur undirvísing 1.-7. árgangi. Komandi skúlaár verða 8 lærarar og 84 næmingar í Eiðis skúla.

Hús við Marknagilsvegin

Við hesum verður sethúsaognin Marknagilsvegur 70b, Tórshavn lýst til sølu.

Húsini eru bygd í 1988, eru í tveimum hæddum, hvør á 137 m² umfram hjall.

Kjallarin er óinnrættaður. Í miðhæddini eru durur, gangur, wc, baðirúm, 2 kømur, hjúnarúm, køkur, grovkøkur og stova. Trappa er upp á loftið, sum tilber at innrætta. Partur av arbeiðinum er gjørt. Húsini eru í góðum standi.

Grundøkið er 661 m². Ognin liggur frítt fyri og útsýnið yvir býin og fjørðin er avbera gott.

Ognin verður seld, um hóskandi boð fæst.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

Advokatskrivstovuna
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145

Ein fittur partur av bátastevnuni verður hildin í neystinum hjá Naddoddi. Sjálvur liggur hann á floti og bíðar eftir gestunum, meðan aðrir bátar á savninum eru fluttir út um, meðan stevnan er

Mynd: Edvard Joensen

Bátastevnan verður sett í dag

Seinnapartin í dag fer Jóannes Eidesgaard, løgtingmaður, at seta norðurlendsku Báta- og mentanarstevnuna á Tvøroyri

SIGLING
Edvard Joensen

Tvøroyri: Stóra norðurlendska Báta- og mentanarstevnan, sum hildin verðiur á Tvøroyri um vikuskfitið, verður alment sett í Miðbýnum í dag klokkan 14.00.

Finnleif Guttesen, borgarstjóri, fer at bjóða vælkomin til Tvøroyrar, áðrenn Jóannes Eidesgaard, løgtingsmaður, fer at seta sjálva stevnuna.

Skráin byrjaði annars, tá fyrstu gestirnir komu við Smyrli hóskvøldið. Tá var café í neystinum hjá Naddoddi Inni á Tanganum.

Í gjár varð latið upp aftur klokkan 14.00, har Don Petersen helt fyrilestur um føroyska bátin, og ein sonevndur víkingasteinur varð avdúkaður. Um kvøldið var dansur bæði á bryggjuni og í TB húsinum.

Í dag er kappróður, og ymsu framsýningarnar á stevnuni eru opnar. Tær eru millum annað í Bygdarsavninum í gomlu læknahúsunum, í handlinum hjá Thomsen, eins og høvið verður at síggja kirkjuna. Stóra veitslan verður í ítróttarhøllini klokkan 20.00.

Í morgin verður guðstænasta í Tvøroyrar kirkju, og um viðrar verður farið útferð við Smyrli kring Suðuroynna. Dagurin endar við undirhaldi, har bæði finskur fólkadansur og føroyskur dansur verða at síggja uttan fyri ítróttarhølina í Trongisvági.

Sosialurin

Lesið Sosialin - tað loysir seg

Politistur

Eitt arbeiði við avbjóðingum

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.

Høvuðsuppgávan hjá politinum er:
- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribygja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur ikemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur vera hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgaranum.

Eitt arbeiði allan sólarringin

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.

Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at rokka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er allatíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

Løn og útbúgving

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiðið– fast starv sum politistur.

Menning og karriera

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



Ynskir tú at vera við?

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelaganum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði – og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

Meira kunning

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraður og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

Føroya Landfúti
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 35 14 48 Fax 35 14 49
Heimasíða: www.politi.fo

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. Fýra politistar skulu setast í 2003.
Umsóknarfreistin til hesa upptøkuroyndina er 1/9-2002